# besta jólagávan

H. N. Jacobsens BÓKAHANDIL




*Suður og norð*
*Álmanakkin umborð*
*Eystur og vestur*
*Álmanakkin er bestur*

Hetta er 81. árgangur av Álmanakkanum.

Álmanakkin er eitt tað mest lisna og brúkta uppslagsverkið í landinum.

Í Álmanakkanum finnur tú tær mest almennu upplýsingarnar, tú hevur brúk fyri.

**Fæst kring alt landið**

H. N. Jacobsens Bókahandil · tel 311036 · www.hnj.fo · hnj@hnj.fo


# KT-umsitari til Snarskivuna

Tín uppgáva verður at taka stig til nýggjar og menna verandi KT-skipanir á Snarskivuni, soleiðis at alsamt størri partur av uppgávunum á deildini verða stýrdar á ein nýmótans og brúkaravinarligan hátt fyri bæði kundar og umsiting.

Ætlanin er ikki, at tú skalt forrita nýggjar KT-skipanir, men tú skalt hava hegni til KT, duga at seta orð á hvørjar skipanir kunnu stuðla undir arbeiðinum á Snarskivuni, og saman við veitarum standa fyri menning, røkt og undirvísing í slíkum.

**Snarskivan**
er tænastuliðið millum Tórshavnar kommunu og borgaran. Snarskivan hevur ábyrgd av journalskipanini, grundstykkjalistanum, fólkayvirlitinum, barnaansingini, post- og telefonmóttøkuni og vørubílegging, umframt at deildin loysir eina røð av øðrum málum fyri fyrisitingina hjá kommununi. Í Snarskivuni starvast 11 fólk.

**Tínar førleikar**
hevur tú nomið sum teldustøðingur, ella gjøgnum aðra viðkomandi útbúgving og/ella royndir, ið geva líknandi førleika.

Tú hevur góðan málkunnleika í føroyskum, donskum og enskum.

Tú dugir at nýta øll vanlig telduforrit og megnar at stýra og samstarva um eini verkætlan frá byrjan til enda.

**Tínir eginleikar**
eru ágrýtni, evnini at standa á egnum beinum og ein jaligur hugburður mótvegis avbjóðingum og lívinum sum heild.

**Tínir møguleikar**
eru at gerast partur av einum spennandi og dynamiskum arbeiðsplássi við avbjóðandi uppgávum, har trivnaður og starvsfólkarøkt fær høga raðfesting, og møguleikarnir fyri persónligari menning eru góðir.

**Tín løn**
verður í 5. flokki hjá Starvsmannafelagnum, um lýstu førleikakrøvini eru lokin.



Starvið verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu við rætta umsøkjarin.

**Tín umsókn**
skal saman við prógvum og viðmælum vera hjá Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 21. november 2008.

Merkið umsóknina »KT-umsitari til Snarskivuna«.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rók Tummasarson, deildarleiðara, telefon 28 46 44, ella epost: rokur@torshavn.fo

**Tórshavnar kommuna**